## Umstrídd lóg komin aftur

Eitt lógaruppskot, sum í veruleikanum loyvir neyðtøku í hjúnarlagnum, varð herfyri tikið aftur í afghanska tjóðartinginum orsakað av altjóða trýsti, men nú kemur tað aftur í broyttum líki. Nú sigur uppskotið, at sýtir ein kona fyri at nøkta tann kynsliga tørvin hjá manninum, kann maðurin nokta henni mat, til hon slakar. Lógin er ætlað at galda tann shia-muslimska minnilutan í Afghanistan, og sambært Reuters bendir alt á, at hon verður samtykt í tjóðartinginum, hóast fleiri lond og altjóða felagsskapir hava mótmælt. Eisini afghanskir kvinnufelagsskapir hava mótmælt uppskotinum.



## Litava kvinnu til forseta

Dalia Grybauskaite, sum vann stórsigur á forsetavalinum í Litava fyri tveimum mánaðum síðani, varð í gjár tikin í eið sum forseti. Hon tekur við eftir tann 82 ára gamla Valdis Adamkus, sum fór frá eftir at hava verið forseti í tíggju ár. Dalia Grybauskaite er ikki bangin fyri at siga sína hjartans meining, og fleiri hava samanborið hana við bretsku jarnfrúnna Margareth Thatcher, sum eisini er hennara fyrimynd. Grybauskaite,ið stillaði upp sum óheft valevni, men fekk stuðul frá litavksu stjórnini, er fyrsta kvinnan í litavska forsetasessinum, síðani landið fór burtur úr Sovjetsamveldinum í 1990. Hon hevur verið limur í ES-nevndini, síðani Litava kom upp í ES í 2004.



# Grannalondini brynja seg til H1N1

**Í grannalondunum fyrireika heilsumyndugleikarnir seg til, at H1N1 fer at gera um seg av álvara, tá fólk koma aftur úr summarfrí í útlondum. Í Danmark heldur ein professari, at fjórði hvør dani kann fáa sjúkuna**

H1N1
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað sigur seg næstan sjálvt, at vandin fyri at fáa smittuna heim við ferðafólki úr útlondum er stórur, tí hagtølini vísa, at H1N1 ger serliga nógv um seg í londum, sum eru væl umtókt sum ferðamál. Sambært WHO eru meiri enn 33.000 tilburðir skrásettir í USA, næstan 8.000 í Bretlandi, og harafturat eru nógvir tilburðir skrásettir í avhildnum frítíðarstøðum sum Spania, Kýpros og Teilandi.

Danir ferðast nógv um summarið, og danska heilsuverkið fyrireikar seg til nógvar tilburðir av H1N1 seinni í summar. Tann daprasti spádómurin kemur frá professaranum Jens Lundgren, sum starvast á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Hann sigur tað ikki vera óhugsandi, at millum ein og hálvonnur millión danir verða smittaðir, tá H1N1 av álvara fer at gera um seg í Danmark aftan á summarfrítíðina.

### Kann kosta mannalív

H1N1 hevur higartil kravt 466 mannalív kring heimin, men Jens Lundgren sigur, at hjá teimum flestu er H1N1 er mild sjúka. Harafturat vísir tað seg, at hon rakar bara fólk, sum eru fødd aftan á 1957, tí tey eldru hava havt eina líknandi influensu og eru tí mótstøðufør ímóti H1N1. Professarin leggur afturat, at H1N1 er bara hættislig fyri heilsuveik fólk.

- Vandin er sera lítil, men vit sleppa ikki undan, at sjúkan fer at krevja mannalív í Danmark. Tað er skeivt at billa fólki nakað annað inn, sigur Jens Lundgren við DR.

Higartil eru 69 tilburðir skrásettir í Danmark, men heilsumyndugleikarnir ivast ikki í, at tað veruliga talið er størri, tí fleiri hava ikki hildið tað vera neyðugt at fara til læknan og eru tí ikki skrásett.

### Grønland brynjar seg

Í Grønlandi hevur heilsuverkið bílagt heilivág til at viðgera fólk við A-influensu, sum H1N1 eisini verður rópt. Enn er eingin tilburður skrásettur í Grønlandi, men har eins og aðrastaðni vænta heilsumyndugleikarnir, at sjúkan fer at koma, tá fólk koma aftur úr summarfrí í Danmark og aðrastaðni.

Grønlendski landslæknin, Eskild Boeskov, sigur við fjølmiðlarnar, at hann væntar at síggja tann fyrsta tilburðin í býnum Ilulissat, sum er tann best umtókti ferðavinnubýurin í Grønlandi.

Sambært einari avtalu hjá WHO skal tað grønlendska heilsuverkið keypa heilivág til 38.000 viðgerðir fyri H1N1.

### Kunnu viðgera hálva tjóð

Í Íslandi hevur landslæknaembætið bílagt nóg mikið av heilivági til at viðgera helmingion av øllum fólkinum fyri svínakrím, men sambært Haraldi Briem, sóttverjulækna, fáa íslendingar ikki heilivág fyrr enn í september ella oktober.

Higartil eru fýra tilburðir av svínakrími staðfestir í Íslandi. Í trimum førum var talan um fólk, sum høvdu fingið sjúkuna uttanlands, og eitt teirra hevði so smittað eitt fjórða fólk eftir heimkomuna. Haraldur Briem sigur við Morgunblaðið, at soleiðis sum gongdin er í Bretlandi, Spania og øðrum vesturevropeiskum má tað sigast at vera rættiliga sannlíkt, at fleiri tilburðir verða skrásettir í Íslandi seinni í summar.

Íslendski sóttverjulæknin vísir eins og aðrir serfrøðingar á, at svínakrímið rakar ikki tey eldru á sama hátt sum aðrar tílíkar krímsjúkur, og at hetta eftir øllum at døma kemst av, at tey hava havt eina influensu, sum líkist svínakríminum og tí eru meiri mótstøðufør nú enn tað yngra fólkið.

### Aðrar sjúkur verri

Noreg hevur havt umleið 25 tilburðir av A-influensuni, men heilsustjórin, Bjørn-Inge Larsen, sigur við NTB-tíðindastovuna, at tað er bara ein spurningur um tíð, til smittan fer at gera um seg av álvara í Evropa, og at norsk ferðafólk fara at hava smittuna við sær heimaftur.

Norski heilsustjórin sigur, at norsku myndugleikarnir fara ikki at seta nakað umfatandi tiltak í verk fyri at forða sjúkuni at breiða seg, tí tað letur seg ikki gera. Hann roynir samstundis at sissa fólk og vísir á, at heilsuvandin við svínakríminum er munandi minni, enn tær fyrstu upplýsingarnar úr Meksiko bendu á.

Bjørn-Inge Larsen vísir á, at eitt nú er influensan ikki so vandamikið sum ymsar aðrar smittusjúkur, sum ferðafólk skulu ansa eftir so sum malaria, tuberklar og eyðkvæmi.